# Javnaðarflokkurin: Týðandi partar í pensjónsuppskotinum mugu broytast

JOHN JOHANNESSEN
Formaður, Tingbólkur Javnaðarfloksins



**Neyðugt er at gera staðiliga vart við, at uppskotnu broytingarnar í penjónsskipanini einans eru eitt uppskot frá einum embætismannabólki. Politiska viðgerðin er enn ikki meira enn byrjað. Settur er ein tvørpolitiskur bólkur at viðgera uppskotið. Javnaðarflokkurin er ikki samdur við embætismannabólkinum í týðandi lutum. Tí hevur tingbólkurin gjørt sær greiðar niðurstøður til víðari viðgerðina av pensjónsreformi í Føroyum**

Tað er Javnaðarfloksins greiða fatan, at neyðugt er við einum pensjónsreformi, sum hevur til endamáls at tryggja øllum føroyingum eina virðiliga eftirløn nú og í framtíðini.

Hetta verður gjørt í tveimum. Lutvíst við nýggjari skipan fyri eftirlønaruppsparing, og lutvíst við munandi broytingum í almennu fólkapensjónini.

Við lóg verður ein nýggj arbeiðsmarknaðar eftirlønaruppsparing sett á stovn, sum skal fevna um allar løntakarar í Føroyum. Henda eftirlønarskipan skal við eini skiftistíð koma í staðin fyri allar verandi og ógviliga ymisku eftirlønarskipanir, sum eru fingnar í lag við sáttmála millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Nýggja eftirlønaruppsparingin skal byggja á lívrentuháttin, við ávísari lívlangari veiting og ratueftirløn, við ávísari upphædd í eitt áramál.

Samstundis skal skattafyrimunurin til privatar kapitaluppsparingar takast av.

Í almennu fólkapensjónini skulu gerast fleiri broytingar, har høvuðsdenturin verður lagdur á at økja veitingarnar til teirra, ið ikki hava aðrar pensjónir enn almennu fólkapensjónina og Samhaldsfasta at líta á.

Í dag er tann størri parturin av fólkapensjónini ein grundarupphædd, sum óskerd verður veitt øllum yvir 67 ár, uttan mun til aðra inntøku, og tann minni parturin er ein viðbót, sum verður mótroknað av aðrari inntøku.

Henda samansetingini av fólkapensjónini skal broytast soleiðis, at viðbótin verður hækkað munandi og lækkað verður um grundarupphæddina. Hesin leisturin gevur møguleika fyri at hækka viðbótina enn meira enn minkingin av grundupphæddini, soleiðis at endaúrslitið hjá einum, ið ikki hevur aðra pensjón ella inntøku, verður størri enn samlaða pensjónsupphæddin við samhaldsfasta, grundarupphædd og viðbótum er í dag.

Javnaðarflokkurin vil, at reguleringin av viðbótunum verður broytt soleiðis, at mótrokningin av aðrari inntøku verður lækkað munandi, so tað skal fremja hugin til eitt virkið lív á arbeiðsmarknaðinum eftir vanliga pensjónsaldurin.

Samstundis vil Javnaðarflokkurin halda fast við, at tað ikki skal mótroknast frá fyrstu krónu, men at tað framvegis skal verða eitt ávíst inntøkumark, áðrenn mótroknað verður.

Javnaðarflokkurin vil broyta reguleringina av fólkapensjónini, frá støðuni í dag, har bert viðbótin verður regulerað við ein føstum prosentsatsi, til eina nýggja regulering við einum miðaltali av prístali og lønarvøkstri.

Í sambandi við, at ein eldri hjúnarfelagi verður pensjónistur, skal hesin ikki mótroknast inntøkuni hjá yngra hjúnarfelaganum, ið framvegis er á arbeiðsmarknaðinum.

Javnaðarflokkurin vil, at pensjónsaldurin skal sum grundregla framhaldandi vera 67 ár, men markið eigur at vera smidligt, soleiðis at fólk fáa størri frælsi at gera av, nær tey fara av arbeiðsmarknaðinum. Velja tey at útseta pensjónina, skulu tey kunnu fáa endurgjald við hækkaðari viðbót. Samstundis skal verða betri møguleiki hjá teimum, sum mugu gevast á arbeiðsmarknaðinum av sliti, til at kunna fáa framskundað pensjónina.

Javnaðarflokkurin heldur, at miðast skal eftir, at vit við árunum flyta okkum frá at gera mun á ógiftum og giftum, og í staðin javnseta øll sum sjálvstøðugar persónar. Miðað verður eisini eftir at umskipa uppihaldsskylduna soleiðis, at samlivandi verða viðgjørd eins og hjún.

Fyri at tryggja framtíðar pensjónsviðurskiftini í Føroyum, vil Javnaðarflokkurin fremja henda pensjónsreformin við munandi broytingum í almennu fólkapensjónini, og við at stovna eina nýggja skipan við eini eftirlønaruppsparing, sum skal fevna um allar løntakarar í Føroyum.

Javnaðarflokkurin tekur sostatt ikki undir við, at pensjónsaldurin verður hækkaður og at mótroknað verður í fólkapensjónini frá fyrst tjentu krónu afturat pensjónini.

Viðvíkjandi fyritíðarpensjónini tekur flokkurin ikki undir við, at mótroknað verður frá fyrstu krónu. Hetta tí, at tað er beinleiðis í mótstríð við teir stóru batar, ið vórðu framdir undir fyrru ABC samgonguni, við tí endamáli at stimbra fyritíðarpensjónistin til eitt virkið lív á arbeiðsmarknaðinum, alt eftir arbeiðsførleika.

# Tann sosiala kumpassin

HANS B. DANBJØRG
Porkeri

Tað sum ovrógvar teirri Sosialu kumpassina tykist vera, at onkur hevur hug at drekka sprittið. Og so sjálvandi fullveldismagnetin, sum dreygar alt til íslendskar tilstandir.

Rósa Samuelsen leitar eftir pengum, sum skulu loysa hennara uppgávur, sum landsstýriskvinna og veit ikki, hvar hon skal fáa kabalina at ganga upp.

Góða Rósa, monnum so líkt, at kasta frá sær, tá fløkja er komin í, so var eisini í Íslandi.

Eg skal koma við nøkrum hugskotum, sum kanska kunnu hjálpa tær at greiða uppgávuna um at spara pensjónistarnar fyri óneyðugar byrðar skaptar av “úlvum í seyðaskinni” sum søgan tekur til.

• Fullveldispolitikarar eiga at fara 50% niður í løn

• Tey alment løntu eiga at ofra eina viku um mánaðin

• Javnaðartingmenn eiga at ofra tvær vikur um mánaðin

Her eru fleiri milliónir at gera gott við.

Fullveldispolitikkur er orsøk til, at so lítið er í landskassanum. Javnaðarmenn sum eiga at ofra seg fyri tey veiku í samfelagnum hava mist stavnhaldið og eru farnir til at fríggja til bæði høgru og vinstru. Og hettar upp á rokning hjá javnaðarveljarum.

Abbasonur Pól F. sála, skyldmannin, var bersøgin á ólavsøku, har hann segði »Eg átti ein abba, sum segði, at fjøldin er býtt«, tað var um, hví ikki bara, at satsa upp á einstakar, hann ivaleyst meinti. Men hví blíva pensjónistar og onnur góð fólk við at velja upp í saman aftur, tá politikarar svíkja. Sum teir her gera. Teir sleppa ov lætt, hvat við at seta teym treytir?

Teir gomlu høvdu politikkin sum hjartamál og ikki sum »potens forleingjara, sum nútímans politikarar tykjast at brúka sín politiska sess til, fram um at røkja áhugamálini hjá veljaranum.

Eitt annað sum eg lærdi í samfundslæru, á norska háskúlanum, sum eg var á sum ungur, var um, hvussu norðmenn takladu fíggjarkreppuna í tríatiárunum.

Og har var samanborið við danir.

Har bleiv sagt, at meðan mangir norðmenn doyðu í hungri, sluppu danir betur, tí teir fóru og læntu pening so leingi nakað var at fáa. Hvar norðmenn startaðu við at spara. Tá so norðmenn sóu, at teir ikki makt-aðu støðuna við egnari megi og royndu seg við at fáa hjálp, var ongin hjálp at heinta, ongin hevði nakað at læna av.

Hettar sigur so mikið, at bæði danir og norðmenn sóu eina loysn við at læna, til teir komu burtur úr kreppuni.

Hvat gera okkara politikarar, teir vilja spara so tey veikastu koma í klemmu, og kanska teirra »neyðarróp« loysa upp fyri einari loysn, sum teir í dag ikki tora at taka.

Politikararnir eru ikki teir fyrstu sum blíva svangir. Tað hava teir syrgt fyri.

Vónandi onkur teirra lesur hettar og fær ringa samvitsku. So er nógv vunnið.

# OVA- stevna

JÓANES K. ANDREASEN

Nú er aftur ein OVA-stevna, og pengar koma inn á kontoina til svimjihylin, men tann stóri spurningurin er, hvussu nogv er komið til henda góða svimjihyl?

Fyri 20 árum síðan var undirritaði við til at samla pengar inn til hylin, og vit lótu 1,2 milión í ca. 1995, og onki hordust aftur, og man fær onki at vita, um man spyr, man hoyrir bert, at pengarnir eru brúktir til ferðir og annað fjas, tað kann ikki passa, pengarnir vóru oyramerktir.

Einaferð í heyst var ein nólsingur í Sosialinum og úttalaði seg um hylin og hvussu reiskir teir vóru har úti.

Stevnurnar hava goldið eitt hol har úti, var og hugdi, jú min sann har var eitt hol og okkurt var eisini stoypt.

Eg eri ikki fakmaður á økinum, men hatta man neyvan hava kostað meir enn 3-4 hundrað túsund krónur, og stevnurnar geva ca. 100 túsund krónur pr. ár, so nú er tann brennandi spurningurin, hvussu nógvir pengar standa á bók ár 2009 við renternes rente væl at merkja.

Vildi vurderað ca. 2,5 - 3 milliónir krónur?

Verið nú so mikið at tykkum komin, og latið Føroya fólk hoyra frá tykkum har úti.

Ymiskar søgur ganga í Havn, manið tær til jarðar.

Matseðil

Hósdagin 13. august
Spareribs / Høsnarungabringa

Fríggjadagin 14. august
Rullusteik / Kjøtfrikadellur / Lasagna

Leygardagin 15. august
Coulottesteik

Mánadagin 17. august
Kókað neytakjøt / Knettir

Týsdagin 18. august
Grýturættur / Rivjasteik

Mikudagin 19. august
Bollar í Karry / Stoktur fiskur

Til ber at keypa døgurða við heim

Matstovan í Hoyvík

Lesið Sosialin - so eru tit við